Álit

í

løgtingsmáli nr. 100/2020: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjófeingi (Sjófeingislógin) (Heimild hjá landsstýrismanninum at krevja rættindahavarar eftir upplýsingum og at taka veiðirættindi aftur, strika treytina um veiðiloyvi og fiskiloyvi í bólki 5 í sambandi við ávíst slag av vinnuligum royndum og verkætlanum ávikavist fyri royndarfiskiskap og vinnuligar fiskiroyndir)

Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Jacob Vestergaard hevur lagt málið fram tann 5. mars 2021 og eftir 1. viðgerð tann 15. mars 2021 er tað beint Vinnunevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 8. og 23. apríl 2021.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við umboð fyri Fiskivinnuráðið og landsstýrismannin í fiskivinnumálum, Jacob Vestergaard.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Bjørt Samuelsen, Bjarni Hammer, Henrik Old og Bjarni Kárason Petersen) hevur hesar viðmerkingar:

Sjófeingislógin hjá samgonguni er longu broytt nógvar ferðir, síðani lógin kom við ársenda í 2019. Hesaferð kom landsstýrismaðurin í Løgtingið við uppskoti um at lata upp fyri atgongd til at fiska uttan veiðiloyvi. Hetta, sum annars segðist vera ein grundsúla undir fiskivinnulóggávu teirra.

Hetta hendir samstundis, sum samgongan í øðrum lógaruppskoti bakkar frá eini aðrari av høvuðsásetingunum í sjófeingislógini, nevniliga, at allur veiddur fiskur skal landast í Føroyum fyri at vera atkomuligur til virkingar og virðisskapan í Føroyum. Grundgevingin er ikki ein miðvísur fiskivinnupolitikkur á sjógvi ella landi, men at hetta er neyðugt fyri at kunna áseta eitt veiðigjald á uppsjóvarfisk. Eitt veiðigjald, sum bíðað hevur verið eftir í tvær tingsetur, og sum í skrivandi stund eingin veit, um tað verður egg ella ungi.

Tað er trupult, fyri ikki at siga ógjørligt at hóma, hvør fiskivinnupolitikkurin hjá samgonguni er. Lóggávan er við mongu broytingunum, og teimum, sum eru ella verða gjørdar í løtuni, ein sannur fløkjustampur. Tá samgongan tók við, valdi hon at avtaka lógina um fyrisiting av sjófeingi, og at samtykkja eina heilt nýggja lóg, nevnd Sjófeingislógin. Men fet fyri fet tykist samgongan at bakka frá hesum sínum egnu avgerðum og sínum egna barni.

Samgongan gjørdi nógv burturúr, at stórar nøgdir skuldu setast av til vinnuligar royndir og verkætkanir, tað, sum í undanfarnu lóg varð kallað menningarkvotur, og hvørs endamál er nýmenning og atkoma hjá fleiri. Samstundis varð eitt nýtt hugtak seinni innført, nevnt ískoytiskvotur.
Nú kemur enn eitt hugtak og nýtt slag av loyvum inn í lóggávuna, nevniliga fyribils veiðiloyvi, men sum ikki er tað sama, sum tey verandi veiðiloyvini. Tey fara kanska, um landsstýrismaðurin vil, at kunna gerast varandi eftir nøkrum árum.

Í 2020 kolldømdi landsstýrismaðurin arbeiðið hjá umsitingini í mun til býtið av kvotum til vinnuligar royndir og verkætlanir, og einki varð býtt út. Hetta hóast tað undir undanfarnu samgongu varð ført fram, at tað fór at taka ein fyrrapart av býta menningarkvoturnar. Ætlanin hjá samgonguni er heilt greitt stig fyri stig at leggja hesi rættindi um til varandi loyvi til úrvald, uttan at tað kemur greitt fram, hvørji hesi ella verkætlanirnar hjá hesum eru. Her er einki gjøgnumskygni og einki armlongdarprinsipp yvirhøvur.

Hóast latið verður upp fyri, at tað nú í ávísan mun fer at bera til at fáa kvotur at fiska uttan at eiga skip við atknýttum veiðiloyvi, so er kravið fyri tey virki á landi, sum fingu menningarkvotur, at hesi skulu annaðhvørt útvega sær skip, ella eru tvungin at selja sínar kvotur innan 1. januar 2022. Alsamt færri gerast javnsett eftir lógini.

Meirilutin mælir staðiliga frá, at fiskivinnulóggávan verður enn meira skeiklað og ógjøgnumskygd.

Meirilutin tekur ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Jákup Mikkelsen, Johan Dahl og Beinir Johannesen) hevur hesar viðmerkingar:

Tá vit hava við nýhugsan í vinnuligum verkætlanum at gera, er tað umráðandi, at vit hava neyðuga fleksibilitetin til at fáa tað vinnutól, sum er best egnað til endamálið í hvørjum einstøkum føri.

Við verandi sjófeingislóg har samgongan aftur hevur knýtt rættindini at stálinum pr. 1 januar 2022, kann tað verða ein forðing, júst tá tað hevur við verkætlanir at gera.

Tí verður mælt til, at tað er møguligt at fáa skip inn, har atknýtt verður fyribils veiðiloyvi við serligum treytum fyri at fremja ætlanina.

Tíðaravmarkingin fyri hesar vinnuligu verkætlaninar er upp til 5 ár at fáa prógvað, at tær eru vinnuliga burðardyggar. Um tað vísir seg, at ætlanin ikki ber til, so fella givnu rættindini aftur til landið.

Minnilutin metir, at hetta er ein góð loysn fyri at hava neyðuga fleksibilitetin til slíkar ætlanir og mælir Løgtinginum til at taka undir við málinum.

Minnilutin setir fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

1. Í § 1, nr. 7 verður § 49, stk. 1 orðað soleiðis:
   "Av kvotunum av svartkjafti, norðhavssild og makreli, sambært § 14, stk. 1 og § 15 og rættindum sambært § 17, verða í minsta lagi 50% latin til vinnuligar royndir og verkætlanir, ið hava við sær menning, nýskapan og virðisøking í gagnnýtsluni av nevndu fiskasløgum. Av nøgdini sambært 1. pkt. kann kvota eisini verða latin umsøkjarum í sambandi við verkætlan, ið fevnir um ítøkiligt keyp umsøkjarans av fiskifari uttan veiðiloyvi ella uttan fiskiloyvi í bólki 5, sum tó, áðrenn endalig tilsøgn kann verða givin, lýkur treytirnar sambært § 5, stk. 1, nr. 2-5. Tilsøgn um kvotu sambært 2. pkt. kann verða latin, um landsstýrismaðurin við støði í umsóknartilfarinum og umstøðunum annars metir, at íløgan í

fiskifarið kann bera seg við teimum minstu nøgdunum, ið søkt verður um. Um umsóknin verður gingin á møti, letur landsstýrismaðurin fiskifari, ið ikki frammanundan hevur veiðiloyvi, ávikavist fiskiloyvi í bólki 5, eitt fyribils veiðiloyvi ávikavist fyribils fiskiloyvi í bólki 5, sum er galdandi í tíðarskeiðinum endaliga tilsøgnin er í gildi. Fiskifarið kann við fyribils veiðiloyvinum ávikavist fyribils fiskiloyvinum í bólki 5 fiska av tillutaðu nøgdunum sambært endaligu tilsøgnini, og fiskifarið kemur annars í tíðarskeiðinum endaliga tilsøgnin er í gildi undir somu rættindi og skyldur sum eigarar av fiskifari við veiðiloyvi ávikavist fiskiloyvi í bólki 5, tó uttan at vera fevnt av § 7, stk. 1 og 2. Fiskifar við fyribils veiðiloyvi, ávikavist fyribils fiskiloyvi í bólki 5, kann fáa endaligt veiðiloyvi, ávikavist endaligt fiskiloyvi, um treytirnar fyri hesum eru loknar sambært stk. 4, 3. pkt. Umsøkjarar skulu lúka treytirnar ásettar í stk. 3, og umsøkjarar eftir kvotum sambært 1. pkt. skulu harumframt lúka treytirnar ásettar í stk. 5."

2. Í § 1, nr. 9 verður í § 49, stk. 6 "uttan veiðiloyvi ella uttan fiskiloyvi í bólki 5" broytt til: "við fyribils veiðiloyvi ella við fyribils fiskiloyvi í bólki 5".

3. Í § 1, nr. 12 verður í § 50, stk. 1, 2. pkt. aftan á "fiskifari" sett: "undir føroyskum flaggi"

4. § 1, nr. 13 verður strikað.
§ 1, nr. 14 verður eftir hetta § 1, nr. 13.

Viðmerkingar:
Til nr. 1:
Mett verður, at grundarlagið fyri ítøkiligum keypi av fiskifari kann gerast í so smábýtt, um fiskifarið einans kann fiska av tillutaðu nøgdunum sambært § 49, stk. 1, 2. pkt. Tær kvoturnar kunnu ikki flytast og/ella avhendast sambært vanligu reglunum í lógini, men verða latnar fyri eitt ár í senn sambært stk. 4, 2. pkt.
Til tess at tryggja eitt betri grundarlag verður tí skotið upp, at landsstýrismaðurin, umframt at lata kvotur til ítøkiligt skipakeyp fyri eitt fiskiár í senn, kann geva umsøkjarum, hvørs umsókn til ítøkiligt skipakeyp verður gingin á møti, eitt fyribils veiðiloyvi. Við fyribils veiðiloyvinum kunnu eigararnir av fiskiførum koma undir somu reglur sum eigarar av fiskifari við veiðiloyvi annars í mun til eitt nú keyp og sølu av kvotum ella at fiska fyri rættindahavarar sambært § 49, stk. 1, 1. pkt. – tó uttan at talan gerst um eitt endaligt veiðiloyvi sambært § 7, stk. 1 og 2.
Eitt fyribils veiðiloyvi verður bert galdandi í tíðarskeiðnum, at endaliga tilsøgnin um vinnuligar royndir og verkætlanir sambært § 49, stk. 1, 2. pkt. er í gildi. Um landsstýrismaðurin ikki metir, at grundarlag er fyri at leggja tillutaðu nøgdirnar um til egnar árskvotur sambært § 49, stk. 4, 3. pkt, ella hann ikki endurnýggjar kvoturnar, falla øll veiðirættindi aftur til landið. Tó skal viðkomandi í teimum førum fáa eitt rímiligt høvi at avhenda keyptu kvoturnar endaliga til eigara av fiskifari við veiðiloyvi, áðrenn tilsøgnin verður sett úr gildi ella fer úr gildi. Um landsstýrismaðurin hinvegin metir, at grundarlag er fyri at leggja kvoturnar til vinnuligar royndir og verkætlanir sambært § 49, stk. 1, 2. pkt. um til egnar árskvotur, fær eigarin av fiskifarinum endaligt veiðiloyvi ávikavist fiskiloyvi í bólki 5 við støði í tillutaðu rættindunum, umframt at hann sjálvsagt varðveitir tær nøgdir, sum møguliga eru keyptar í tíðarskeiðinum, at endaliga tilsøgnin var í gildi.

Til nr. 2:
Av tí at skotið verður upp at broyta ásetingina soleiðis, at mann kann fáa eitt fyribils veiðiloyvi sambært § 49, stk. 1. 2. pkt. verður broytingin í § 49, stk. 6 umorðað samsvarandi.

Til nr. 3:
Mett verður, at tað er skilabest, at fiskifari skulu vera skrásett undir føroyskum flaggi. Eisini tey, sum ikki hava vanligt veiðiloyvi.

Til nr. 4:
Mett verður, at treytin um veiðiloyvi framhaldandi skal vera galdandi fyri vinnuligar fiskiroyndir sambært § 50, stk. 4.

Við hesum broytingum og viðmerkingum tekur minnilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Vinnunevndin, 27. apríl 2021

Bjørt Samuelsen formaður	Johan Dahl næstformaður	Bjarni Hammer
Henrik Old	Bjarni Kárason Petersen	Beinir Johannesen
	Jákup Mikkelsen	